

## Rósa og Annika til reiðar

Tær báðar løgtingskvinnurnar í Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum eru til reiðar at fara í landsstýrið í eini møguligari nýggjari ABC-samgongu. - Eg eri til reiðar at fara í landsstýrið, um áheitanin kemur, og málsøkið er tað rætta. Men tað er umráðandi, at fólkini, sum verða vald í landsstýrið, hava kvalifikatiónir á økinum, og enn vita vit ikki, hvørji málsøki, vit fáa í eini møguligari samgongu. Tí er alt framvegis opið, sigur Annika Olsen. Løgtingskvinnan fyri Sambandsflokkin, Rósa Samuelsen, sigur, at hon er klár at fara í landsstýrið, um hon fær áheitan, men hon leggur eisini dent á, at tað veldst um, hvat málsøkið verður.



# ÚF víðkar senditíðina

**Mánadagin byrjar Útvarp Føroya vetrarskránna, og sum eina roynd byrjar »Góðan morgun Føroyar« at senda klokkan seks á morgni – nú eisini við kvinnuligum verti**

ÚTVARP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Manningin á »Góðan morgun Føroyar«. Frá vinstru Øssur Egholm, Kári Sólstein, Vár Berghamar Jacobsen, Jákup Magnussen og Kári Olsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Største broytingin í sendiflatuni hjá Útvarpi Føroya verður, at nú kunnu tey morgunfrísku fáa annað enn tónleik at hoyra í útvarpslurtinum.

Stórar bygnaðarbroytingar hava verið í Kringvarpinum sum heild, og hóast nýggi programmleiðarin ikki formliga hevur tikið við starvinum enn – tað ger hann 1. oktober – so hevur Herluf Sørensen kortini sett síni fingramerki á vetrarskránna.

- Tað verða onkrar broytingar í skránni. Tann størsta er helst, at vit byrja at senda »Góðan morgun Føroyar« klokkan seks á morgni. Hetta verður gjørt sum ein roynd, og her verður serliga hugsað um tey mongu, sum koyra bil tíðliga á morgni, sigur Herluf Sørensen, settur programmleiðari hjá Kringvarpinum.

Morgunsendingin fer at leggja seg eftir at fylgja við ferðsluni og siga frá veðrinum. Og so verður eisini kvinnuligur vertur í sendingini.

- Vit meta, at um helmingurin av lurtarunum eru konufólk, og tí er tað ógvuliga viðkomandi, at tað er kvinnuligur vertur í sendingini. Tí tað er nú einaferð soleiðis, at konufólk duga betur at gera sendingar til konufólk, sigur Herluf Sørensen.

Vár Berghamar verður nýggja kvinnuliga røddin, og so verður ein gamal kenningur eisini knýttur at morgunsendingini, nevniliga Jákup Magnussen.

Fyrsta tíman – millum seks og sjey – verður bert hin eini verturin, men so verður full maning frá sjey og fram til sendingin endar klokkan tíggju.

### Reyður tráður

Jákup Magnussen verður eisini at hoyra í einari fastari sending millum fimm og seks seinnapartar.

- Hetta er ein nýggj sending, sum fær heitið »Gestastovan«, har Jákup Magnussen fer at tosa við ymisk fólk um ymsar lutir. Talan verður um eina »Nón«-líknandi sending, sigur Herluf Sørensen.

Sum nakað nýtt verður seinnaparturin millum trý og fimm meiri »streymlinjaður« enn hann hevur verið.

- Talan verður um somu sending allan vegin gjøgnum vikuna. Tað verða sostatt ikki ymsar sendingar við ymsum heitum hesa tíðina seinnapart. Tað verða fólkini av »Bylgjuni«, sum fara at standa fyri hesum sendingunum saman við Elin í Stórustovu, sum eisini kemur inn í hetta toymið, sigur Herluf Sørensen.

Hetta verður so ein reyður tráður gjøgnum seinnapartssendingarnar, men við tað at Elin í Stórustovu verður partur av vertunum, verða tær ungdómssendingarnar, sum hon vanliga stendur fyri, ikki at hoyra.

- Men tað ætla vit at rætta upp aftur eftir nýggjár, tí talan er um eina fyribils skrá hesar tríggjar mánaðirnar, sum eftir eru av árinum. Og teir fara vit so at brúka til at leggja skránna til rættis fyri restina av vetrinum, og tá verður kanska okkurt nýtt og spennandi á tapetinum, sigur Herluf Sørensen.

### Bert smávegis broytingar

Tá tað kemur til sjónvarpið, verður ikki talan um tær stóru broytingarnar.

- Sjónvarpið er nógv tyngri at arbeiða við. Har mást tú taka hædd fyri kulissum og øðrum, sum tú heilt sleppur undan í útvarpinum, sigur Herluf Sørensen.

So á tí økinum fara teir at halda fast um tað, sum plagar at vera. Men tó verður talan um eina broyting.

- Mentanartíðindi hava higartil mest sum bert verið fyri elitumentanina. Tað ætla vit at broyta soleiðis, at fríggjakvøldið eftir Dag og Viku vendir sær til ein breiðari hyggjaraskara, fer at fáa ein nýggjan vert og eitt nýtt navn, sigur Herluf Sørensen.

Og í sambandi við mentan fer útvarpið eisini at leggja størri dent á, at loyva tónleikinum framat.

- Vit ætla at røkja tónleikaáhugan betri soleiðis, at fleiri stílartir sleppa fram at. Men hetta verður so lagt eftir prime-time, altso seinni út á kvøldið, sigur Herluf Sørensen.

Eitt annað, sum komandi programmleiðarn fer at leggja dent á, er at skilja ímillum útvarp og sjónvarp soleiðis, at ikki báðir miðlarnir seta fokus á somu tíðindi.

- Tað eru jú summi tíðindi, sum egna seg betur til sjónvarp og onnur, sum egna seg betur til útvarp. So vit fara í heila tikið at leggja dent á, at fáa tann ágóðan burtur úr, sum stendst av, at miðlarnir eru lagdir saman, sigur Herluf Sørensen, sum altso tekur við sum programmleiðari í Kringvarpinum 1. oktober.